# Jóanes setur lívi

**Tað besta við at skriva sjónleik er, at tað er loyvt at brúka narkotika, sigur skaldið Jóanes Nielsen, sum setur lívið uppá spæl í nýggja leikinum »Aftan á undrið«**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Onki minni enn lívið verður sett uppá spæl, nú Tjóðpallurin setur øll segl til í uppsetingini av nýskrivaða leikinum hjá Jóanesi Nielsen »Aftan á undrið«

- Eg rokni við, at fólk fara at hugsa eitt sindur øðrvísi um, hvat tað vil siga at vera menniskja, aftaná »Aftan á Undrið«, sigur Jóanes Nielsen.

## Á markinum til lívið

Hugskotið til leikin fekk Jóanes Nielsen, einaferð hann fór at hugsa um, hvat mundi henda við trædronginum Pinocchio, eftir at hann var blivin menniskja.

- Tað fekk meg so aftur at gruna yvir, hvør definitiónin uppá eitt menniskja í grundini er. Eg meini, um man sum Pinocchio ikki er gjørdur av eini mammu og einum pápa, hvat slag av menniskja er man so?, spyr Jóanes Nielsen.

*Er tað, at Pinocchio bleiv til menniskja, so "undrið" sum sipað verður til í heitinum »Aftan á undrið»?*

- Ja, eitt av teimum. Men tað er eisini eitt undur, tá drongurin David leikinum kemur í puberten, har allar kenslur leika so hart á. Hartil hendir alt hetta, beint sum lívið kanska gleppur Davidi av hondum, sigur leikhøvundurin og sipar til, at ungi drongurin líðir av eini álvarsligari sjúku.

- Lívið blívir so innarligt og máttmikið, tá vit standa á markinum til endan av tí. Tá blívur sjálvt lívið eisini eitt enn størri undur, sigur Jóanes Nielsen

## Rúsur og skræpa

Í leikinum droymir ungi David, at hann blívir ein vanligur, frískur drongur, líka sum Pinocchio bleiv tað, meðan Pinocchio hevur sítt stríð av at vera blivin ein vanligur drongur. Og soleiðis ferðast leikurin aftur og fram millum dreym og veruleika, har fólk, sum David hevur kent og elskað ella ikki orkað fyri, fáa eginleikar frá verum úr søguni um Pinocchio.

- Í dreymunum hjá Davidi ber alt til. Í grundini er hann eitt lítið skald, og tí sleppi eg sum høvundur eisini at stjala við hond og fót frá øllum møguligum øðrum søgum, sigur Jóanes, sum altíð hevur verið sera bergtikin av sjónleiki sum listagrein.

Tí skuldu øll segl eisini setast til hesuferð í eini eksplosión av leikarum, tónleiki, sangi, ljósi og dreymakendum pallmyndum í eini tí størstu uppsetingini hjá Tjóðpallinum nakrantíð.

- Tað besta við at skriva sjónleik er, at tað er loyvt at brúka narkotika. Tá ein sjónleikur veruliga logar er tað reint narkotika, ein fantastiskur rúsur, sigur ein spentur Jóanes Nielsen, sum ikki rættiliga tímir at hugsa um timburmenninar beint nú.

Men kenna vit høvundan rætt, fara vit at føla onkran stingin, tá rúsurin er hæsað-




*Sjónleikur sýr seg altíð um okkum sjálvi. Og onkuntíð man niður í skræpuna fyri at vita, hvar vit koma frá, heldur rithøvundurin Jóanes Nielsen*